# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fimtan nýggir næmingar í Føroya Banka



TÍÐINDASKRIV

Herfyri lýsti Føroya Banki eftir nýggjum næmingum, og rættiligur gravgangur var eftir at sleppa at læra í bankanum. Fimtan nýggir næmingar eru nú farnir til verka. Lærutíðin er tvey ár, og næmingarnir skulu royna seg á flest øllum økjum í bankanum og haraftrat standa royndir í fleiri lærugreinum.

Næmingarnir, sum nú eru byrjaðir í Føroya Banka, eru: Bjørt Splidt, Bárður Anthoniussen, Allan Enghamar, Elisabeth Jacobsen, Niclas K. Niclasen, Joan Danielsen, Rúni Rasmussen, Kaj Ennigarð, Anita Knudsen, Sjúrður Ellefsen, Heidi Mortensen, Anly S. Joensen, Allan Smedemark, Rakul Borg og Kristian á Reynatrøð

†

## Andlát og jarðarferðir

**Joen Peter Ellingsgaard**, vanliga nevndur **Pedda í Garði, á Eiði**, fer til gravar úr Eiðis kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Pedda, kunnu lata Eiðis kirkju eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Lítli Petur Pauli**, sonur Marjun og Artur Johansen, Strendur, andaðist á Landsjúkrahúsinum mánadagin, 1 ára gamal. Farið verður frá kapellinum á Landssjúkrahúsinum í kvøld kl. 19. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast lítla Petur Paula kunnu lata eina peningagávu til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Konto í Sparikassanum.

**Judith Henriksen úr Sandavági**, ættað úr gomlustovu í Sumba, andaðist á Ellisheiminum í Vágum týsdagin 12. septmeber, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður av Ellisheiminum leygardagin kl. 13 í Sandavágs kikjugarð.

Kistan við **Dánjal Jákup Johannesen á Nesi** fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Dánjal, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið Tabor á Toftum.

†

**Lítli Petur Pauli Johansen**
sonur Marjun og Artur Johansen á Strondum

andaðist á Landssjúkrahúsinum
mánadagin 11. september.
Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum
mikukvøldið kl. 19.00.

Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju
fríggjadagin kl. 14.00.

# VIÐMERKINGAR

## Vendið um, meðan tíð er

MOLLY E HØJGAARD
Skopun

Nú má eg skriva av kærleika til Guðs orð fyrst og fremst, síðan fyri okkara land. Í okkara tjóðsangi stendur í einari reglu: “Eg nígi tí niður í bøn til tín Guð”, og tað má gerast og biðja eftir, at Hann bønhoyrir okkum og rekur hetta gudloysi av landinum. Tit ræðast ES, men Guð er meir at óttast enn ES, - eina søkkandi skútu, - nei, setið tykkum í tað himmalsku skútuna, sum aldri kann søkka. Setið ikki tykkara álit á ES; okkara løgtingsmenn og tit, ið stýra, setið álit tykkara á Guð, - tað heldur! Hansara er gullið, hansara er jørðin og øll fylling hennara. ES kann einki gera. Tað hevur signing við sær at reka hatta har sum tað hoyrir heima.

Um tey vilja so gjarna giftast, so farið og standið fyri tí harra, sum stendur aftanfyri slíkar andstygdir; farið inn í satanskirkjurnar og giftið tykkum, tí frá honum er tað komið og honum tilhoyra slíkar andstygdir.

Guð kemur aldri at vælsigna slíkt, tí at skrivað stendur í 1. Mós. 18, 22: “Tú mást ikki hava samlegu við mann eins og við konu; tað er andstygd”, og í 3. Mós. 20, 13: “Hevur maður samlegu við mann á sama hátt sum við konu, tá fremja teir báðir andstygd; teir skulu láta lív; blóðsekt hvílir á teimum”.

Og so má sigast, at eg las í bløðunum, at talið av ungum homoseksuellum monnum í Danmark, sum verða raktir av AIDS, vekstur støðugt.

Tí gav Guð teir upp í skammloysis girndir; tí at bæði konufólk teirra skiftu hin náttúrliga umgang um við hin ímóti náttúruni, og á sama hátt løgdu eisini mannfólkini av hin náttúrliga umgang við konufólk og brunnu í fýsni sínum hvør at øðrum, so at mannfólk gjørdu skemdargerð við mannfólki og fingu afturfyri á seg sjálvar tað viðurlag fyri villu sína, sum beint var. (Rómverjabrævið 1, 26-27)

Og so skrivi eg við størsta kærleika: Minnist til Sódomu og Gororru og syndaflóðina og vendið um, meðan tíð enn er!

Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav Son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á Hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.. (Jóh. 3, 16)

**Dagurin í morgin**

**14. september. Dýrd krossins.** Eisini rópt krossmessa um heystið. Krossurin, sum drotningin Helena fann, Kristi krossur, varð tikin og fluttur burtur av heidningum, men funnin aftur og førdur til Jerusalems. Dagurin hátíðarhildin til minnis um hesa hending. 14. september er eisini dagurin, tá ið atkvøðugreiðsla í 1946 var í Føroyum um samband við Danmark ella loysing.

Sosialurin
www.sosialurin.fo